# Føroyingar trúgva upp á jólamannin

**– Bitland er eitt samtak, sum hevur 12 føroyskar eigarar. Men Bitland er annað og nógv meira enn tað. Bitland er ein visjón um eitt land - Bitland. Tað er í mínari útlegging ein visjón um at bróta onki minnið enn eina ómetaliga skaðiliga megi**

BITLAND
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað sigur Tróndur Djurhuus, formaður í nevndini hjá smápartafelagnum Bitland. Felagið hevði hósdagin eitt sokallað BitTing á Hotel Føroyum, har hugleitt varð um Bitland, teirra virksemi, og teirra visjónir – serliga visjónirnar hjá formanninum Trónda Djurhuus.




*Tróndur Djurhuus: Ongin skal misskilja meg. Eg havi sum allir aðrir føroyingar stóra virðing fyri teimum pionerunum, sum ímóti øllum odds offraðu bæði lív og heilsu og familjulív fyri at vinna okkum fantastiskt inntøku-potentialir til havs. Ongin ivi um tað. Men eg haldi ikki, at vit hava tænt teirra entreprenørship. Vi hava gjørt tað til skammar við at skula basera alla okkara vælferð á tað entreprenørship'ið hjá tí einstaka, sum offraði seg og sítt fyri at finna ein fiskastovn, sum vit kundu troyta*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Tann ónda ringrásin við jólamanninum

– Tann ónda ringrásin vísir seg upp á tann mátan, at tá trúgva vit, politikarar og onnur, upp á ein æviga høgan fiskastovn, varandi høgar fiskaprísir, og jólamannin. Tað merkir, at okkum nýtist ikki at gera íløgur í nakað annað í framtíðini. Okkum nýtist ikki at gera íløgur í vinnumenning. Okkum nýtist ikki at gera íløgur í gransking. Tí tað gongur jú fínt. Hetta er í mótsetning til tær tíðirnar, hvar tað til dømis er vánaligur fiskiskapur. Tá ber onki til, og vit hava ikki ráð til at investera í framtíðina. Og tað er ein ringrás, sum tað ongantíð fyrr hevur verið so týdningarmikið, at fingið brotið hana, sigur formaðurin í nevndini hjá Bitlandi.

Tróndur Djurhuus finst at fyrrverandi samgongum og núverandi samgongu um teirra hugburð til vinnumenning. Føroya Landsstýri skar í játtanini til gransking, tá løgtingsfíggjarlógin varð samtykt, við teirri grundgeving at sparingar vórðu framdar allastaðni, og tískil mátti granskingin eisini verða fyri skerjingum.

– Øll vita, at eg arbeiði á eini fyritøku, sum hevur gjørt stórar sparingar. Men vit hava ikki skorið niður upp á tær upphæddirnar, sum vit seta av til menning og gransking, sigur Tróndur Djurhuus, sum eisini er menningarstjóri í Føroya Tele.

### Ómetaliga áhugaverdir politikarar, men lítil stertur

Men Tróndur sigur, at glottar eru at hóma viðvíkjandi politikarum og teirra áhuga og vilja at raðfesta gransking og vinnumenning hægri.

– Tað eru eisini uppmuntrandi ting. Tá ein tosar mann til mann við fleiri politikarar, so fær mann ómetaliga interessant prát. Og eg haldi, at tað skal vera ein uppgáva hjá Bitlandi at hjúkla um tað sambandið, soleiðis at vit kunnu verða við til at venda tí politiska vektorinum, ella hvønn veg mann hyggir í Føroyum. So fáa vit í hvussu so er ein búskap við høvdi, men bara partvís við sterti, sigur Tróndur Djurhuus.

### Vinnulívið sum Songbók Føroya Fólks

– Hyggja vit at Írlandi, so var Írland eitt neyðarsligt og fátækt landbúnaðarland fyri ikki so langari tíð síðani, faktiskt relativt fáum árum síðani, hvar teirra vinnulív minti um allar hesar balladurnar, sum vit sita og syngja, hvar tað er so synd í øllum. Men írar hava latið hatta verðið eftir í fólkasanginum og hava broytt sítt vinnulív til at vera high-tech, soleiðis at Írland í dag er eitt av teimum londunum, sum er fremst í Europa, sigur Tróndur Djurhuus.

– Men í Føroyum minnir vinnulívið enn ov nógv um tað, sum stendur í Songbók Føroya Fólks. Vit hava ikki gjørt skilnað millum framtíðarbúskapin og okkara fólkasang, heldur Tróndur Djurhuus.

### Politiska elitan

– Og tað er kanska har, at vit skulu gera nakrar broytingar. Vit mugu taka tað langa seiga toyggið, sum tað er at koma fram til nøkur nýggj vinnulív. Men, og nú vendi eg mær til nakrar serligar addressatar, tað krevur eisini eina politiska elitu í landinum, sum er til reiðar at gera tað, sigur Tróndur Djurhuus.

Hann heldur, at politiski hugburðurin til gransking og vinnumenning er øvugtur.

– Gransking og vinnumenning eru útreiðslur og ikki neyðugar íløgur, soleiðis sum tað í veruleikanum er. Vit svíkja ungdómin við at arbeiða upp á handa mátan politiskt og nokta ungdóminum ta vælferðina, sum vit halda er ein sjálvfylgja í dag, sigur Tróndur Djurhuus.

### Landsskaðiligt og monokulturelt

Tróndur Djurhuus leggur tó dent á, at hann virðismetir tað etableraða vinnulívið, serliga fiskivinnuna og framtaksmennirnar í fiskivinnuni. Men hann saknar ein fjøltáttaðan hugburð.

– Ongin skal misskilja meg. Eg havi sum allir aðrir føroyingar stóra virðing fyri teimum pionerunum, sum ímóti øllum odds offraðu bæði lív og heilsu og familjulív fyri at vinna okkum fantastiskt inntøkupotentialir aðrastaðni til havs. Ongin ivi um tað.

– Men eg haldi ikki, at vit hava tænt teirra entreprenørship. Vi hava gjørt tað til skammar við at skula basera alla okkara vælferð á tað entreprenørship'ið hjá tí einstaka, sum offraði seg og sítt fyri at finna ein fiskastovn, sum vit kundu troyta. Tað er ikki at heiðra viðkomandi, at so at leggja alt okkara lív og levnað á herðarnar hjá tí einstaka entreprenørinum. Tvørturímóti.

– Hetta hevur hildið okkum í einari monokulturellari tvingu, sum er ómetaliga ósunn fyri okkum. Og hon er landsskaðilig. So um vit skulu tosa um landsskaðiligt virksemi í framtíðini, so er tað kanska har tað liggur, sigur Tróndur Djurhuus at enda.

## Søgan er úti

Leygardagin var tiltak í skúlanum á Eiði, har bókin um Eiðis søgu eftir Óla Egilstrøð alment varð givin út. Eini 300 fólk vóru til staðar. Eiðis kommuna skipaði fyri tiltakinum og borgarstjórin á Eiði, Tordur Niclasen, bjóðaði vælkomin og greiddi frá bókini. Felagssangur var, og millum sangirnar vóru tað børnini hjá Óla Egilstrøð, sum trinu fram á pallin við røðum um gamla Egilstrøð og yrkingum eftir honum. Framførdu sangirnir vóru allir yrktir av Óla ella umsettir av honum úr øðrum máli. Sanna í Brekkunum sang solo »Eg sat har á hægsta tindi,« og Hans Erland í Brekkunum hevði fylgispæl. Móti endanum flutti Bettemi, einkjan eftir Óla Egilstrøð, fram eina yrking og takkaði. Hátíðarhaldið á Eiði endaði við »Kvøða til heimbygdina Eiði,« og Bettemi signeraði bókina, sum kostar 385 krónur í bókabúðunum.

**hkm**



*Mynd: Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen*

ítróttur
Nr. 110 • leygardagur • 12. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fótbóltsfepur kring alt Europa

**Komandi vikurnar verður tað fótbólturin, sum fer at taka stóran part av skíggjatíðini. Til gleði fyri mong – men helst eisini til øsing hjá eins mongum**

EM
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í dag klokkan 17.00 byrjar so marran hjá mongum húsfrúgvum. Ein marra, sum fer at vara tríggjar vikur fram. Hjá eins nógvum húsharrum er talan tó um kanska størstu gleðina av øllum. Ein gleði, sum bara er tøk annað hvørt ár, tó at videotólið ger, at gleðisløturnar kunnu heintast fram til meira enn bara minni soleiðis av og á.

### Heimsins besta undirhald

Talan er sjálvandi um EM-endaspælið í fótbólti, sum næst eftir HM-kappingina man vera tað, sum allir fótbólts-elskarar leingjast eftir, og sum fyri eina tíð fær hesi at gloyma alt um tær skyldur, sum annars liggja á láni. Ja, hjá summum kann enntá húsfólkið annars og arbeiða glíða í bakgrundina hesar vikurnar.

Hesa ferð er tað so í Portugal, at kappingin skal haldast, og við slogan'inum, we love football, fær hetta ikki annað enn ljóðað lokkandi. Einki er at ivast í, at portugisar sjálvir elska fótbólt, og latínska blóðið fær ofta lyft spælið og spenninginum í hesum upp á eitt slíkt støði, har vit norður-europearar meira kølnir bara hyggja at, uttan veruliga at fata, hvat gongur fyri seg hjá hesum fólki.

Eisini her í Sosialinum fara vit at fylgja við, hvussu leikur fer. Hvønn dag verða tíðindi at frætta frá kappingini. Smærri dystarfrásagnir standa sjálvandi á skránni, umframt at tíðindini um skaðar, leikbann, klandur og gleði í ymsu EM-legunum eisini verður at síggja.

Og so er tað eisini stóra EM-spælið. Nú leygardagin er seinasta freist at tekna seg til kappingina, og so er annars at halda seg framat, ta´gitast skal um úrslitini í ymsu dystunum.

Í dagsins blað verður talan so um eina stutta gjøgnumgongd av ymsu bólkunum, og so er bara eftir at ynskja øllum eina góða EM-kapping.



*Bóltsnillingar sum eitt nú Zidane fara komandi tríggjar vikurnar at undirhalda á sjónvarpsskíggjanum*

### Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur**

**1. deild menn**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 12.06 | NSÍ-EB/S | Oddmar Andreasen |
| 13.06 | HB-KÍ | Dagfinn Olsen |
| 13.06 | VB-B36 | Eiler Rasmussen |
| 13.06 | Skála-GÍ | Petur Skarðenni |
| 14.06 | ÍF-B68 | Suni Johansen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | FSV-KÍ | Jens P. Brattalíð |
| 12.06 | LÍF-Sumba | Petur H. Joensen |
| 12.06 | AB-TB | Regin Egholm |
| 12.06 | Roynd-B36 | Eiler Rasmussen |
| 13.06 | VB-B71 | Tummas P. Olsen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | NSÍ-EB/S | Ransin N. Djurhuus |
| 13.06 | Skála-GÍ | Jan Gardar |
| 13.06 | HB-SÍ | Jónleif Frederiksen |
| 13.06 | ÍF-B68 | Hans F. Hansen |
| 14.06 | TB-Fram | Poul Poulsen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 13.06 | B36-Sumba | Laurits í Króki |
| 13.06 | FSV-EB/S | Kristin av Kák |
| 13.06 | AB-KÍ | Finnur Andreasen |

**EM-endaspælið**

| Dagf. | Kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 12.06 | 17.00 | Portugal-Grikkaland |
| 12.06 | 19.45 | Spania-Russland |
| 13.06 | 17.00 | Sveis-Kroatia |
| 13.06 | 19.45 | Frakland-Ongland |
| 14.06 | 17.00 | Danmark-Italia |
| 14.06 | 19.45 | Svøríki-Bulgaria |

Skála-GÍ:

# Skála spælir fyri oddasessinum

**Bert eitt stig skilir nú tey bæði oddaliðini, og tí er einki at ivast í, at Skála fer eftir sigrinum sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skála er framvegis ósigrað í bestu deildini, men hóast teir fegnast um hetta heitið, so iðra teir seg um, at tað ikki eydnaðist at halda fast um tey trý stigini, tá teir seinasta vikuskifti vitjaðu í Klaksvík.

Tað ferðin var liðið nakað skert, tí sterki verjuleikarin, Dusan Jaic, var leikbannaður, men hann er tøkur aftur, nú liðið tekur ímóti GÍ.

Útlendski miðvallarin hjá liðnum, Nenad Stankovic, hevur verið ivasamur í vikuni, men roknað verður fyri vist, at hann er tøkur, eins og bæði Alexandur Johansen, Bogi Gregersen og Iulian Florescu helst eru tað, hóast eisini teir hava drigist við skaðar.

Hjá mótstøðuliðnum, GÍ, tykist tað eisini standa hampuliga væl til við fólki.

Hans Petersen fekk reytt seinast, so hann verður í øllum førum ikki við. Hinvegin verður roknað við, at bæði Atli Gregersen og Áslakur R. Petersen verða klárir. Teir noyddust báðir út við skaða seinast, men teir hava vant aftur í vikuni, og tað tykist ikki vera nøkur forðing fyri teirra luttøku.

So er spurningurin bara, um GÍ verður fjórða offurið á Skála, ella um gøtumenninir loksins skulu venda gongdini, sum bert hevur givið teimum eitt stig seinastu fýra dystirnar.

# Fastar EM-sendingar

**Eisini Útvarpið fer at fylgja væl við, nú EM-kappingin stendur á skránni**

EM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Danmark í 1992 gjørdust europameistarar, munnu flestu minnast, hvussu føroysku frásøgumenninir ferðaðust til Svøríkis til hálvfinaluna, har teir so vóru verðandi, fram til danski sigurin á Týsklandi varð tryggjaður.

Soleiðis verður tað neyvan hesaferð, men Útvarpið fer kortini at fylgja væl við, um enn talan ikki verður um beinleiðis varpan frá dystunum.

Hvørt gerandiskvøld kl. 22.05 – tað er beint eftir at seinni dysturin tann dagin er liðugur - fer ÚF at hava eina serstaka EM-sending. Tosað verður um ymsu liðini, um dystirnar og um einstakar leikarar. Ja, snøgt sagt um alt tað, sum fyriferst kring eina EM-kapping.

Tað verður Heðin Arge, sum fer at verða útvarpsvertur í sendingunum, og at hjálpa sær fer hann at hava fleiri fólk, sum eru køn í altjóða fótbólti. Eisini fara gestir úr føroyska fótbóltsheiminum gestir í útvarpsstovuni.

Stundum fara lurtarnarnir eisini at fáa høvi til at gera sínar viðmerkingar til teir mongu dystirnar, sum eru í kappingini. Sendingin verður haraftrat kryddað við góðum tónleiki og góðum søgum frá EM-kappingina í Portugal, sum alt Europa fer at fylgja við í hesar komandi tríggjar vikurnar.

Fyrsta sendingin verður nú leygarkvøldið. Sunnudagin verður hildið frí, men mánadagin verður so lagt til brots aftur.